# Romantikkur í Viðalundini

**Í samband við Vestanstevnuna verður varpa ljós á eina av vakrastu perlunum í bygdini - Viðalundina. Tú sært hana kanska hvønn dag, men hevur kanska ikki reiðiliga givið tær far um hvussu vøkur hon veruliga er.**

Leygarkvøldið kl.22.30 kanst tú taka tína kæru í hond og leiða hana gjøgnum hugnaligu viðalundina, vekk frá káta stevnularminum eina løtu.

Áðrenn tú sleppur inn, er kravt at tú ognar sær nøkur kærleikorð at hava við á leiðini. Síðan kann spákast á gøtuni fram við gjónni í hugnaligum skerið frá littum ljósum og romantiskum harmonikuljómið. Mynd kann takast á staðnum, at hava við heimaftur sum eitt lítið minnið um túrin. Eftir allan romantikkin kann farast beina leið til hugnaliga midnáttarsamkomu.

# Málningaframsýning á Vestanstevnu

**Á Vestanstevnu verður stór málningaframsýning í Gamla Skúla í Miðvági.**

Á málningaframsýningin í Gamla Skúla verður høvið at síggja listaverk eftir fólkið úr Vágoynni, bæði yngri og eldri. Kendum og minnið kendum.

Framsýningin verður opin hvønn dag frá 15 juli, til og við 18 juli.

Millum mongu sýnararnar kunnu m.a. nevnast Finnbjørn Hansen, Pól Skarðenni, og Petur J. Haraldsen. Á framsýningini verðu eisini høvið at síggja annað listarligt handverk.

# Rock og punk konsert í høllini á Giljanesi.

**Leygarkvøldið 16 juli verður stór tiltak í høllini á Giljanesi við bæði konsert og dansi. Høvuðsnavnið er loyniligt punk orkestur.**

Leygarkvøldið 16 juli verður skipað fyri spennandi tiltaki í høllini á Giljanesi.

Tiltakið byrjar við konsert við trimum aktuellum tónleikabólkum.

**Lama Sea** spæla eina blanding av lívligum funkrocki, ið fyrst og fremst hevur til endamáls at fáa fólk at dansa og hoppa.

**Orkestriii her vesturiii** er júst komin fram við serstakum lagið, sum kanska serliga hevur fanga vágafólk. Onkur flennur at tí, meðan onnur eru heldur skelka.

**Høvuðsnavnið á konsertini er loyniligt, baby!**

Super extremt gott loyniligt føroykst punkrokk orkestur. Manningin telur fáar mans, og teir eru herligir og erligir. Teir liggja á ovastu rók á föroyskum hittlista.

Eftir konsertina verður hildið áfram við tónleiki, og verður tað væl umtókti tónleikabólkurin Rok sum spælur til dans. Stílurin hjá bólkinum liggur mest uppat rock og pop. Bólkurin hevur spælt til konsertir og dans runt alt landið.

# Á vágni og á Vatninum

**Á Vestanstevnu eru tað ikki bert landkrabbar sum sleppa at stuttleika sær**

Umframt kappróður so verða eisini onnur tiltøk á Miðvágsvág.

Frá fríggjakvøldinum til sunnukvøldið ber til at leiga sær ein vatnskutara eina løtu og sigla sær ein túr eftir vágni. Ein kann ikki rokna við at koma turrføttur upp aftur á land, men kann við vissa rokna við, at frá eina serliga og stuttliga uppliving. Byrja verður frá dráttinum við bátahylin.

Frá fríggjakvøldinum ber eisini til at fara sær ein túr oman á gomlu flúgvarabedingina, har Stubbin í Kvívík við sínari "rullandi" framsýning, fer at vísa tað mest spennandi til frítíðina fram.

Á framsýningini verður høvið at síggja ymiskar frítíðarbátar og tað sum har til hoyrir. Eisini verða húsvognar at síggja.

Sunnudagin kl.15.00 byrjar kappsigling við føroyskum 4-mannaførum á Vatninum (Leitisvatn) Her verða bátar úr øllum landinum, og um veðrið er gott, kann ein fáa eina góða løtu í vakra umhvørvinum fram við vatninum, meðan ein eygleiðir litríku seglini fara fram við.


Vit ynskja øllum eina góða Vestanstevnu



John Poulsen
Vatnsoyrar · tel 33 20 34



VÁGAFÓLK
GÓÐA VESTANSTEVNU 2005




Ergoline
CLASSIC 600
+AVANTGARDE
við fløguspælara
og voice-guide

OPNAR FRÁ KL. 10 - 23
(sí skeltir á hurðini)

Kom og royn hesar sólir við nýggjum rørum

SOL - Fa BROS

Í MIÐVÁGI
FARTEL 53 36 36